# Heilsumálaráðið

Dagfesting: 17.06.2024
Mál nr.: 24/15003-2
Málsviðgjørt: BL/GMM
Ummælistíð: 17.06-24.06
Eftirkannað:

**Uppskot til**

## Kunngerð
## um
## undantøku fyri gjaldsskyldu av heilsutrygdargjaldi

Við heimild í § 24, stk. 5 í løgtingslóg nr. 178 frá 22. desember 2009 um almenna heilsutrygd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 29. mai 2024 verður ásett:

**§ 1.** Persónar, sum hava bústað í Føroyum, men sum rinda til sosiala trygging í øðrum Norðanlandi vísandi til Nordisk Konvention om social sikring, og sum ikki kunnu draga gjaldið frá, vísandi til skattalógina, kunnu eftir umsókn verða undantiknir at rinda heilsutrygdargjald frá inntøkuárinum 2024.

**§ 2.** Umsókn um undantøku fyri at rinda heilsutrygdargjald skal latast inn talgilt umvegis Vangan.
*Stk. 2.* Umsøkjari skal skjalprógva, at hann hevur rætt til undantøku at rinda heilsutrygdargjald, undir hesum skjalprógva, at hann, í inntøkuárinum, hevur arbeitt minni enn 25% í Føroyum. Harumframt skal umsøkjarin skjalprógva, at hann rindar til sociala trygging í øðrum Norðanlandi.
*Stk. 3.* Heilsutrygd viðger umsóknir um undantøku frá gjaldsskyldu. Í sambandi við viðger av umsóknum, kann Heilsutrygd útvega sær upplýsingar frá øðrum viðkomandi myndugleikum, undir hesum TAKS.
*Stk. 4.* Tá ið umsøkjari ikki longur rindar heilsutrygdargjald í øðrum Norðanlandi, hevur hesin skyldu til at fráboða Heilsutrygd hesum, soleiðis at viðkomandi aftur skal gjalda heilsutrygdargjald í Føroyum.

**§ 3.** Tá persónur byrjar arbeiði í Norðanlandi ella gevst at arbeiða í Norðanlandi og sambært Nordisk Konvention om social sikring skal rinda til sosialar tryggingar í arbeiðslandinum fyri einans ein part av einum inntøkuári, verður undantøka frá gjaldsskyldu veitt soleiðis:
1) Undantak frá gjaldsskyldu fyri fasta heilsutrygdargjaldið sambært § 24, stk. 1 í løgtingslóg um almenna heilsutrygd er galdandi frá tí mánaði, umsøkjarin fær rætt til undantøku, og er galdandi til mánaðin, tá

umsøkjarin ikki longur hevur rætt til undantøku.
2 ) Undantak fyri prosentgjaldið sambært § 24, stk. 1 í løgtingslóg um almenna heilsutrygd er galdandi fyri tann part av skattskyldugu inntøkuni, sum er vunnin frá tí degi, umsøkjarin fær rætt til undantøku og er galdandi fyri tann part av skattskyldugu inntøkuni, sum er vunnin til tann dag, umsøkjari ikki longur hevur rætt til undantøku.
*Stk. 2.* Inntøka, sambært stk. 1, nr 2, sum ikki kann sigast at hoyra til eitt ávíst tíðarskeið í inntøkuárinum, verður deild í mánar við frítøku í mun til mánar uttan frítøku. Mánin tá umsøkjarin fær rætt til undantøku og mánin har umsøkjarin ikki longur hevur rætt til undantøku verða roknaðir uppí frítøkutíðarskeiðið.

**§ 4.** Um ein persónur hevur givið Heilsutrygd skeivar upplýsingar ella tagt um umstøður, sum hava týdning fyri gjaldsundantøku sambært § 24, stk. 2. í løgtingslóg um almenna heilsutrygd, kann Heilsutrygd eftirfylgjandi krevja inn gjaldið, ið viðkomandi av órøttum ikki hevur goldið.

**§ 5.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. juli 2024.

Heilsumálaráðið, 17.06.2024

**Margit Stórá**
landsstýriskvinna

/ Bjørgfríð Ludvig